Fríggjadagur 24. oktober 2008

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**

TELEVARPIÐ

Sosialurin

# VARPIÐ



SvF • Fríggjadag 24. kl. 19.00

## »Talent 2008« - Finala

Átta talent hava strítt seg allan vegin fram til finaluna. So í kvøld skal slagið standa. Teir tríggir dómararnir hava vikuskifti eftir vikuskifti leita eftir talentum. Øll hava havt møguleikan á pallinum. Men í kvøld hava hyggjararnir alt at siga. Teir gera av hvør fær heitið »Talent 2008« og fjórðingsmilliónina!



Dr2 • Týsdag 28. kl. 22.00

## »Autograf: Preben Kristensen«

Saman við Thomas Eje og Anders Bircow gjørdi hann uttan iva eitt tað besta avrikið innan danskt undirhald: Linie Tre. Við síðuna av hesum hevur hann eisini havt eina framúr góða yrkisleið sum sjónleikari.

KRINGVARP

SvF • Sunnudag 26. kl. 20.00

## »Í hansara hondum«

Í hansara hondum er ein dokumentarfilmur um listamannin Janus Kamban og vinalag Janusar við listamannin Hans Paula Olsen, sum byrjaði yrkisleið sína sum myndahøggari í atelierinum hjá Janusi. Filmin hevur Ingun í Skrivarastovu framleitt.